# Fundarbók hjá Eysturkommunu
# 520 Leirvík

_________/_________ **Síða**

**Jóhan Christiansen, borgarst./ Erik Lervig,skr.**

**Býráðsfundur mánadagin 24. juni 2015 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Ólavur Olsen, Hanna Jensen

**Fundurin lokin kl. 21.30**

| | Fundarskrá: | Fundarsamtykt: |
|---|---|---|
| 1. | **15/00189**<br>**Umbøn um ummæli av frábýti matr. nr. 86a í Norðragøtu**<br>Umsóknin fevnir um loyvi at frábýta seyðahúsið frá festinum 86a , Norðragøtu bygd, vídd umleið 550 m$^2$.<br><br>Tekniska umsiting mælir til loyvi at gera frábýti av matr. nr. 86a í Norðragøtu.<br><br>Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at viðmæla frábýtið av matr. nr. 86a í Norðragøtu sambært áheitan frá Búnaðarstovuni. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum byggi- og býarskipanarnevndini. |
| 2. | **15/00198**<br>**Umsókn um stuðul – Eldrafelagið Fjallið**<br>Mentanarnevndin mælir til at veita stuðul á 40.000 kr.<br><br>Peningur verður tikin av konto 5.24.14.510 (Stuðul til mentan).<br><br>Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini. | Einmælt samtykt at taka at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini. |
| 3. | **10/00313 og 15/00222**<br>**Bussleiðin í Eysturkommunu**<br>Støðutakan til tilboð frá AP. Busskoyring<br><br>Vinnunevndin mælir til at taka av tilboðnum um at verðandi sáttmáli heldur fram umframt at koyrt verður í feriunum, fyribils í 1 ár.,og at kostnaðurin hækkar stigvíst frá núverandi til kostnaðin sambært tilboðnum frá AP-bussum dagfest 16/6-15.<br><br>Vinnunevndin mælir til at sáttmálin verður galdandi í 3 ár við møguleika at leingja sáttmálan | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini og fíggjarnevndini.<br><br>*Ólavur Olsen var úti undir viðgerðini vegna ógegni.* |

**Býráðsfundur mánadagin 24. juni 2015 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Ólavur Olsen, Hanna Jensen

**Fundurin lokin kl. 21.30**

við 2 árum.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini.

**4. 13/00350**

**Keyp av matr. nr. 139 í Syðrugøtu**

Í sambandi við keyp av jørð til pottar, savna og umstøður til dypparar, fyriliggur uppskot um sølu/keyp av matr. nr. 2 í Syðrugøtu .

Umsitingin mælir til at gera avtala við ánaran uppá fyriliggjandi uppskot.

Peningurin til keypi verður tikin av konto 6.11.32.511 Fríðkan av kommununi (Løgujáttan)

Byggi og býarskipanarnevndin mælir frá at ganga uppskotinum á møti, men kanna aðrar møguleikar at útvega lendi.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini.

**5. 15/00108**

**Umsókn um uppískoytisstykki til matr. nr. 428b í Leirvík**

Tann 27 apríl samtykti býráðið at viðmæla at IRF fekk loyvi at keypa lendi (matr nr. 194a í Leirvík til støddar 9.583 fermetrar).

Eftirfylgjandi hevur H. Konoy sent Umhvørvisstovuni umsókn um at keypa part av sama lendi, sum so er sent Eysturkommunu til ummælis.

Vinnunevndin mælir til at halda fast við býráðssamtyktina frá 27.apríl 2015 um at viðmæla at IRF fær loyvi at keypa lendi.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini

*Árni Jacobsen og Jóhan Christiansen vóru úti undir viðgerðini vegna ógegni.*

# Fundarbók hjá Eysturkommunu
# 520 Leirvík



**Býráðsfundur mánadagin 24. juni 2015 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanus Jacobsen, Hjalti Dalheim, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen, Emma Rasmussen, Ólavur Olsen, Hanna Jensen

**Fundurin lokin kl. 21.30**

**6. 15/00000**

**Val av nevndarlimi í báta- og listasavnsnevndini**

Mentanarnevndin mælir til at Fríði B. Nielsen verður valdur í nevndina fyri Erik Lervig.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum mentanarnevndini.

**7. 15/00196**

**Endurskoðan av fíggjarætlanini**

Í sambandi við fíggjarætlanararbeiðið fyri 2015, var semja um at fíggjarætlanin skuldi endurskoðast áðrenn summarfrítíðina.

Tilmæli frá fíggjarnevndini fyriliggur til fundin.

Einmælt samtykt ongar broytingar at gera á verandi fíggjarætlan.

**Eysturkommunu býráð:**

Jóhan Christiansen ______________________________

Hanus Jacobsen ______________________________

Hjalti Dalheim ______________________________

Árni Jacobsen ______________________________

Oluffa Joensen ______________________________

Brandur Jacobsen ______________________________

Emma Rasmussen ______________________________

Ólavur Olsen ______________________________

Hanna Jensen ______________________________